Tórshavn, tann 16. mars 2023

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Viðv. hoyringssvari viðvíkjandi broyting í løgtingslóg um veiðigjøld.

Felagið Nótaskip hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld. Vit loyva okkum vinarliga at gera hesar viðmerkingar til uppskotið.

Ov stutt hoyringsfreist
Í fyrsta lagi loyvir felagið sær at viðmerkja, at vit halda, at hoyringsfreist í eina viku er alt ov stutt tíð til at viðgera eitt so umfatandi uppskot, sum hevur stórar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Í uppskotinum eru ongar útgreiningar, um hvørjar avleiðingar uppskotið hevur fyri teir ymsu skipabólkarnar. Tí eru fýra yrkadagar alt ov stutt tíð til at gera neyðugu útgreiningarnar og at geva uppskotinum ta neyðugu viðgerðina. Uppskotið skal avgreiðast, áðrenn løgtingið fer í summarfrí, og tær fyrstu broytingarnar koma ikki í gildi fyrr enn 1. august 2023. Tí hevur viðgerðin ikki tílíkan skund.

Ov høg gjøld
Eftir okkara fatan eru veiðigjøldini í Føroyum ivaleysa høg, og tí eiga tey ikki at verða hækkað. Í talvuni niðanfyri er víst, hvat veiðigjøldini eru í Íslandi og Grønlandi fyri uppisjóvarfisk 1. januar 2023, sammett við føroysku gjøldini í uppskotinum. Vit meta, at hetta er kappingaravlagandi.

Kr.	Føroyar	Ísland	Grønland	Føroyska veiðigjaldið í mun til hægst (IS/GL)
Makrelur	1,46	0,17	0,40	+ 265%
Sild	0,89	0,17	0,25	+ 256%
Lodna	0,98	0,28	0,15	+ 250%
Svartkjaftur	0,31	0,12	0,15	+ 107%

Í Noregi verður ikki kravt inn veiðigjald. Skipatalið í uppisjóvarflotanum er stórt, og kvoturnar hjá einstøku skipunum so smáar, at har verður ikki skapt nøkur tilfeingisrenta. Vit mugu ansa eftir, at vit ikki koma í somu støðu í Føroyum. Ongin ivi er um, at uppisjóvarkvoturnar fara at minka í komandi árum. Hetta fer at hava við sær, at tilfeingisrentan minkar. Í hesi støðu er ikki rætt at hækka veiðigjaldið, tí vit kunnu koma í ta støðu, at tað heldur ikki verður møguligt at endurnýggja henda partin av flotanum.

Vit halda, at tað kann fara at verða torført at áseta veiðigjaldið á lodnu eftir somu skipan sum fyri makrel og sild, tí stór sveiggj hava verið í avreiðingarprísunum seinastu árini. Lodnuvertíðin er bert nakrar fáar vikur í februar/mars, og tí kundi eitt uppskot verið, at áseta veiðigjaldið eftir miðal prísinum í vertíðini, tá hon er av í mars.

Greiningar av roknskapunum hjá 11 nóta- og ídnaðarskipum seinastu árini vísa, at árini frá 2017 til 2021 hevur samlaði skatturin, sum fevnir um partafelgasskatt, útsettan skatt og tilfeingis- og uppsølugjøld, verið omanfyri 50% av úrslitinum áðrenn skatt. Vit halda, at hetta er ein sera hørð skatting, sum ikki finnur sín líka í okkara grannalondum.

Skeivar fyritreytir í útrokningini av tilfeingisrentuni
Vit hava higartil ikki sæð nakra eintýdda ítøkiliga definitión av tilfeingisrentuni. Vit halda, at útrokningarnar hjá búskaparfrøðingunum í almennu fyrisitingini av tilfeingisrentuni fullkomiliga hava skeiklað uppfatanina av tilfeingisrentuni í politisku skipanini og í almenninginum.

Seinasta greiningin av tilfeingisrentuni varð gjørd í 2017. Tá roknaðu búskaparfrøðingarnir seg fram til, at "veruliga" tilfeingisrentan hjá teimum 12 uppisjóvarskipunum, sum vóru við í útrokningini, var 821 mió. kr. av eini nettosølu upp á 1,475 mia. kr. og einum bruttovinningi somleiðis upp á 821 mió. kr.

Tað átti at verið óneyðugt at sagt, at hetta kann ikki bera til. Komið varð fram til hetta úrslitið, tí í hvussu so er tríggjar av fyritreytunum eftir okkara tykki vóru skeivar.

Í fyrsta lagi varð útrokningin gjørd út frá, at tað vóru 166 ársverk á hesum 12 uppisjóvarskipunum. Veruleikin er, at tað eru 24 ársverk á hvørjum av tangaskipunum, og nakað fleiri ársverk umborð á Norðborg. So rætta talið skuldi verið í minsta lagi 240 ársverk.

Í øðrum lagi varð útrokningin gjørd út frá, at ein normalløn á einum uppisjóvarskipi er 400 tús. kr. Verður henda upphæddin útgreinað eftir yvirmannapørtunum í verandi sáttmálum við manningafeløgini, so hevði árshýran hjá einum dekkara verið góðar 250.000 kr., um hann var mynstraður alt árið. Lønin fyri hvørt ársverk hevði sostatt verið umleið 125 tús. kr.

Í triðja lagi varð "normalur profittur" roknaður sum 6% av bókaða virðinum á skipunum, sum tá var tilsamans 1,353 mia. kr. Í 2017 vóru tey 12 skipini millum 7 og 23 ára gomul, og tí var bókaða virðið nógv niðurskrivað. Eitt nýtt skip í hesum flokki kostar í dag 3-400 mió. kr. at byggja. Tí má spurnartekin setast við, um bókaða virðið er eitt hóskandi útrokningargrundarlag, og um 6% er tað rætta talið fyri "normalan profitt". Eitt nú kann nevnast, at sonevnda risikofría rentan er hækkað við 3 %-stigum síðani í juli í fjør. Um støði verður tikið í 10 nótaskipum sum eru verd 300 mió. kr. hvørt, so hevði árliga teoretiska tilfeingisrentan minka við 90 milliónum krónum bara av rentuhækkingini.

Í útrokningini av "veruligu" tilfeingisrentuni í 2017 stavaði tann størri parturin frá sokallaðum yvirnormalum hýrum. At ein útrokning grundað á eina skeiva teoretiska meting av vanligum hýrum við nótaskipum nú gerst grundarlag fyri ógvusligum hækkingum í veiðugjøldunum á pelagisku vinnuna, er beinleiðis ósakligt.

Harumframt eru roknskapartølini ikki reinsað fyri inntøkur, sum reiðaríini hava frá øðrum virksemi, enn at reka fiskivinnu, og tey eru heldur ikki reinsað fyri óviðkomandi lønarútreiðslur.

Samanumtikið má sigast, at vóru verulig tøl brúkt í greiningini, so hevði "veruliga" tilfeingisrentan verið fleiri hundrað mió. kr. lægri. Verandi sáttmálar hjá Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum umboða tey rættindi, sum feløgini søguliga hava vunnið sær í samráðingum við Føroya Reiðarafelag. Hesi viðurskifti kunnu ikki broytast her og nú, uttan so at løgtingið ætlar at áseta hýrurnar við lóg.

Vinnan og myndugleikarnir áttu at sett seg saman og komið fram til eina felags uppfatan av tilfeingisrentuni.

Hækkingarnar í veiðigjaldstalvunum eru ov høgar
Vit halda, at hækkingarnar í veiðigjaldstalvunum eru alt ov høgar. Tað er torført at gjøgnumskoða neyvt, hvørjar avleiðingarnar eru av hesum. Hetta hevði helst kunnað verið gjørt meira gjøgnumskygt, um stigin varð skipaður á sama hátt sum hjá t.d. alivinnuni, har stigini eru fá og fevna víðari.

Vit halda ikki, at tað nú skal lóggevast fyri at broyta veiðigjaldstalvurnar í 2026 við 2%, sum skal tryggja landskassanum kompensatión fyri inntøkurnar frá 8-ára uppboðssølunum í 2018 og 2019, sum fella burtur í 2026 og 2027. Tað átti at verið ásannað, sum ætlanin var, at nú fellur uppboðssølugjaldið burtur, og nú gjalda hesar kvotur vanligt veiðigjald. Tað er ikki rætt, at tey, sum ikki hava bjóðað ella ikki fingið boð á uppboðssølunum, skulu gjalda fyri teir boðsgevarar, sum bjóðaðu ov høgt.

Skeivt at økja veiðiorkuna í uppisjóvarflotanum
Síðan fyrsta fiskivinnunýskipanin varð sett í verk, eru seks eldri uppisjóvarskip komin afturat í flotan, og okkara meting er, at longu nú er ein yvirkapasitetur í uppisjóvarflotanum. Tí vilja vit staðiliga heita á myndugleikarnar, um ikki at loyva, at fleiri skip koma í uppisjóvarflotan, tí yvirkapasiteturin etur burtur av tilfeingisrentuni.

Við tí øktu fiskiorkuni í uppisjóvarflotanum, útláta vit samanlagt í dag munandi størri nøgdir av CO2, tá vit fiska okkara kvotur. Fiskiskipini standa fyri einum sera stórum parti av samlaða føroyska útlátinum, og í løtuni finst ongin alternativ loysn til at avmarka útlátið, enn at fiskiorkan verður avmarkað til júst tað, sum krevst, fyri at fáa kvoturnar fiskaðar. Ein annar møguleiki, fyri at minka um útlátið, er at halda fram við at endurnýggja flotan, tí nýggju skipini eru munandi effektivari, og hava munandi minni útlát.

Í nøkur ár hava ongar strandalandaavtalur verið um býtið av felagskvotunum av makreli, norðhavssild og svartkjafti. Tí seta londini sínar egnu kvotur hvørt í sínum lagi. Í 2021 vóru samlaðu kvoturnar av makreli 142% av tilmælunum hjá ICES, kvoturnar av norðhavssild 139%, og samlaðu svartkjaftakvoturnar 130% av tilmælinum hjá ICES.

Henda støðan kann neyvan halda fram. Tí er sannlíkt, at kvoturnar fara at minka í komandi árum. Annaðhvørt tí, at strandalondini semjast um eitt nýtt býti, og at kvoturnar fara at minka í hesum sambandi, ella tí at tann støðuga yvirfiskingin av teimum trimum uppisjóvarststovnunum fær avleiðingar fyri fiskiskapin.

Eftir ásetingunum hjá ST í sáttmálanum "United Nations Fish Stock Agreement – UNFSA, sum tekur støði í havrættarsáttmálanum hjá ST, hava Føroyar rætt til at fiska í egnum sjóøki, men tað áliggur okkum ein skylda at medvirka til at felags stovnar verða umsitnir burðardygt.

Hetta eru okkara viðmerkingar fyribils til lógaruppskotið. Vit vóna, at vit í viðgerðini í løgtinginum av uppskotinum, kunnu hava møguleikar fyri at gera fleiri møguligar viðmerkingar, tí hoyringsfreistin hevur verið so sera stutt.

Vinarliga

Felagið Nótaskip

Jógvan Jespersen,*stjóri*

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tíórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip..fo